*Forkvinnan í Lærarafelagnum fult álit á semjuni:*

# Ikki fleiri verkfall sum hetta í mínari tíð sum formaður

*– Vit hava havt ein mann hinumegin borðið, sum var ein „problemknúsari“ og tað var tann avgerandi munurin, sigur Elsa Birgitta Petersen*



*Elsa Birgitta Petersen og Høgni Hoydal taka í hondina á hvørjum øðrum eftir lokið verk. Bæði hava tey fult álit á, at eitt gott úrslit fer at spyrjast burturúr teimum avtalum, sum eru gjørdar. Tað, sum fekk glið á samráðingarnar var, at Høgni Hoydal kom uppí-og at Lærarafelagið hevði heimild at gera eitt sáttmála upp á standandi fót.*

ÁKI BERTHOLDSEN

– So leingi eg eri forkvinna í Føroya Lærarafelag verða tað ikki fleiri stríð í fólkaskúlanum, sum hetta.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, hevur fult álit á semjuni, sum varð gjørd við Landsstýrið seint sunnukvøldið og sum gjørdi ein enda á sjey viku langa verkfallinum í fólkaskúlanum.

Í hesi nýggju semjuni hevur Lærarafelagið fingið fleiri avgerðandi mál við afturímóti teirri semju, sum 78% av lærarunum vrakaður á frumatkvøðu á páskum.

– Eitt høvuðsmál er, at ætlanin at seta arbeiðstíðirnar hjá donskum lærarum í gildi í Føroyum er slept.

– Ístaðin fyri skal ein arbeiðsbólkur setast at gera uppskot um eina nýggja arbeiðstíð fyri føroyska skúlan.

Nevndin skal verða liðug 31. desember í ár.

Men tað stendur eisini í semjuni, at verður nevndin ikki liðug til tíðina, ella fæst ikki semja, kann landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum áseta arbeiðstíðina einsamallur.

*– Er Lærarafelagið í veruleikanum sostatt ikki sett fullkomiliga út av spælinum?*

–Nei tað er hon avgjørt ikki. Tað er soleiðis, at einhvør nevnd byggir á herðararnar á øllum teimum nevndum, sum áður hava verið og hvør hevur sínar fortreytir at arbeiða útfrá.

– Og hetta er ein áseting, ið varð gjørd í avtaluni, sum varð gjørd um arbeiðstíð í 1998, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Men sett út av spælinum heldur avgjørt ikki, at lærararnir eru.

–Vit hava tveir av fýra limum í nevndini, sum skal gera nýggju ásetingarnar um arbeiðstíðina. Uppskotið skal til ummælis hjá limunum í Lærarafelagnum.

– Og harafturat skal tað roynast í verki á nøkrum úrvaldum skúlum í skúlaárinum 2001-2002 fyri at vita, hvussu tað riggar, áðrenn tað verður sett í verk í fullum líki frá 2002.

**Ikki aftur í mínari tíð**

Eftir hesi seimjuni eru tað annars rættiliga nógvar nevndir við umboðum fyri Lærarafelagið og Landsstýrið, sum skulu setast at arbeiða við ymsum málum.

Umframt arbeiðstíðina, skal nevnd setast at greina út, gera metingar og mæla til, hvussu nýggja fólkaskúlalógin skal setast í verk, og, hvussu hetta ávirkar viðurskiftini hjá læarunum.

Nevnd skal eisini setast at fáa viðurskiftini hjá lærarunum á Sernámsdeplinum í rættlag og nevnd skal gera eina nýggja reglugerð fyri álitismannaskipanina.

Arbeiðsbólkur skal eisini setast at gera tilmæli um viðlíkahald av søvnum og bólkur skal setast at endurskoða tørvin á tímaniðurskurði til telduvørðar og skúlaleiðslur.

Vit hava spurt Elsu Birgittu Petersen hetta ikki bara er at útseta trupulleikan og um hon ikki innast ikki stúrir fyri, at alt hetta nevndararbeiðið bara fer at føra til fleiri ósemjur, sum líkast hesari?

Men tað er hon ikki.

Tvørturímóti hevur hon fult álit á, at eitt gott úrslit fer at spyrjast burturúr.

– Eg veit væl, hví hendan ósemjan tók seg upp sigur hon. Men hon vil tó ikki útgreina hetta nærri.

Og hon leggur doyðin á, at tað verða ikki fleiri ósemjur sum hendan, so leingi, hon er formaður í Føroya Lærarafelag.

–Tað skal ikki henda undir mínari leiðslu, at ósemja aftur fer at taka seg upp um orð og fólk, sigur Elsa Birgitta Petersen.

**Ein „problemknúsari“**

Vit spurdu hana um tað er tí, at Lærarafelagið hevur fingið størri álit á Landsstýrið nú, enn tað kanska hevur havt?

– Tað veit eg ikki. Men eg má siga, at í samráðingunum hesar báðar dagarnar hava vit havt ein mann hinumegin borðið, sum onkusvegna hevur verið ein „problemknúsari og tað fekk rættiligt glið á samráðingarnar.

Hon sipar til Høgna Hoydal, landsstýrismann í undirvísingar- og mentamálum.

– Vit hava alla tíðina kravt, at hann kom upp í samráðingarnar, tí fyrstani tá fingu vit høvi at tosa við okkara rætta mótpart og arbeiðsgevara.

**Fleiri batar**

Hon er annars ikki samd við Karsten Hansen, tá ið hann sigur, at semjan, sum varð gjørd sunnudagin víkur ikki nógv frá teirri semju, sum varð løgd fram beint fyri páskir.

– Vit eru ikki ovurfegin um sáttmálan. Men heilt so galin er hann ikki, annars høvdu vit ikki skrivað undir

–Vit so frægt afturat við í sáttmálan, sum ikki vóru við í páskasemjuni, sum fall, at nú gildu vit, at vit áttu at skriva undir, tí vit høvdu neyvan komið longur í hesum umfarinum.

– Vit skulu eisini hugsa um, hvat hin møguleikin var. Tað var, at páskauppskotið varð lagt fyri tingið og samtykt við høvd og gørnum og so høvdu vit verið verri fyri, enn vit eru nú.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at fleiri tímaniðurskurðir eru komnir við í sáttmálan, eitt nú er ikki so heilt lítið komið afturat hjá skúlaleiðslum.

Somuleiðis skulu flokslærarar hava endurgjald, um nýggjar reglur fyri teirra arbeiðið verður orðað. Eisini skúlabókasøvnini hava fingið afturat og vit hava fingið fleiri trygdir við í sáttmálan.

Harafturat eru nakrar finnur fluttar, sum eru til okkara fyrimun.

–Hon hugsar fyrst og fremst um, at tey fingu forðað fyri, at arbeiðstíðir, sum eru gjørd til donsk viðurskifti vórðu smoygt niðuryvir okkum. Ístaðin skulu føroyskar arbeiðstíðir setast í verk.

Harafturat hugsar hon um tær nevndir og teir arbeiðsbólkar, sum skulu setast at arbeiða við ymsum málum.

# Karsten Hansen: Lítil munur á

*Tað er lítil munur á semjuni, sum varð gjørd sunnukvøldið og semingsuppskotinum, sum lærararnir vrakaðu á páskum, sigur Karsten Hansen*

ÁKI BERTHOLDSEN

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, er rættiliga væl nøgdur við sáttmálan, sum nú er gjørdur við Lærarafelagið, og at skúlin aftur er komin í rættlag.

– Í høvuðsheitum er rættiliga lítil munur á hesari semjuni og tí semingsuppskotinum, sum varð felt á páskum, í hvussu so er, hvat peningi viðvíkur.

– Lønarhækkingin er tann sama og niðurskurðirnir eru at kalla teir somu.

Har eitt sindur er komið afturat nú, er tað drigið frá onkra aðrastaðni, so at tær broytingar, og tær flytingar sum eru gjørdar, hava fíggjað seg sjálvar innanfyri karmin, sum varð lagdur fyri páskir.

–Tess meiri tímaniðurskurðir, ið ávísir bólkar hava fingið, tess minni er lønarhækkingin hjá einstaklinginum.

–So tær umflokkingar og lønarniðurskurðir, sum eru gjørdir, og lønarviðurskifti annars, er á sama stigi sum í semingsuppskotinum, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at annars eru tær broytingar sum eru gjørdar, mest at roknað sum ætlanaryvirlýsingar av ymsum slag.

Annars fegnast hann um, at skúlin nú aftur er farin at virka.

– Vit máttu hava eina loysn nú, tí tað er longu blivið ov seint hjá teimum, sum skulu til próvtøku.

– Fingu vit ikki eina samráðingarloysn í vikuskiftinum, hevði málið enda í tinginum.

Og Karsten Hansen dylir ikki fyri, at hann er fegin um, at tað slapst undan at fara í tingið.

–Eg eri ímóti at loysa slíkar ósemjur í tinginum.

–Men í hesum føri var støðan heilt serlig, tí tá ið til stykkis kom, vísti tað seg, at vit høvdu samráðast við eina nevnd, sum onga heimild hevði.

Og Karsten Hansen leggur afturat, at tað var heilt avgerðandi fyri víðari samráðingum hetta vikuskifti, at nevndin í Føroya Lærarafelag hevði heimild at gera ein sáttmála.

– So tá ið vit høvdu fingið vissu fyri at so var, ruddaði tað slóð fyri, at farast kundi undir samráðingar aftur, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Og so heldur hann eisini tað, at tað hevði sína ávirkan, at Landsstýrið hevði sett eitt evstamark fyri, nær semja skuldi vera funnin.

– Men so skulu vit heldur ikki gloyma, at báðir partar høvdu størsta áhuga í at fáa málið loyst, leggur hann afturat.



**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# FSF ætlar at flyta landsdystirnar

*Í staðin fyri at spæla í november og í januar ætlar Fótbóltssambandið at dystirnir móti Svøríki og Noregi skulu spælast í mars*



*Venjingarstøðan hjá okkara monnum var ikki nóg í Liktinstein herfyri, og tí roynir FSF nú at broyta fyrireikingarnar komandi ár*

Fótbóltslandsliðið skal í mars komandi ár spæla tveir HM undankappingardystir. Annar verður í Luksemburg 24. mars, og hin verður í Russlandi 28. mars. Fyrri dysturin verður í høvuðsstaðnum í Luksemburg, sum eitur Luksemburg. Tað er ikki heilt greitt enn, hvar hin dysturin verður, men tað tykist liggja í kortunum, at hann verður ikki í Moskva:

– Vit hava skilt á russarunum, at teir eru ikki so hugaðir at leggja dystin í Moskva. Hetta kemst av, at tað er stórur møguleiki fyri, at tað verður kavi í Moskva í mars. Enn hava vit ikki fingið nakra fráboðan um, hvar dysturin verður, men í sovornum førum hava russararnir ofta spælt niðri við Svartahavið.

Hetta sigur Jens Erik Magnussen, sum er formaður í landsliðsnevndini hjá Fótbóltssambandinum.

**Fyrireikingarnar**

Eftir 1–0 sigurin á Liktinstein síðsta mikukvøld var Allan Simonsen rísin, tí hann helt ikki, at spælararnir vóru nóg væl fyri. Hjálparvenjarin hjá honum, Jógvan Martin Olsen, helt, at likamliga støðan hjá spælarunum var ikki av leið, tá tað varð havt í huga, at spælararnir høvdu spælt fýra steypadystir í eina viku, og at teir dagin undan dystardegnum høvdu ferðast langa teinin úr Føroyum og niður til Liktinstein.

Formaðurin í landsliðsnevndini og bæði venjarin og hjálparvenjarin vóru samdir í, at tað verður neyðugt at fyrireika landsliðsárið øðrvísi komandi ár, enn tað hevur verið gjørt undanfarin ár.

– Vit hava seinnu árini verið á venjingarlegu sunnanfyri um mánaðarskiftið januar/februar. Tað kann væl vera, at vit eisini fara á eina sovorna legu komandi ár. Men tað verður neyðugt eisini at gera nakað við felags fyrireikingarnar í mars, staðfesti Jens Erik Magnussen á ferðini í Liktinstein.

**Flyta NM dystirnar**

Jens Erik Magnussen ásannaði eisini, at fyrireikingarnar mugu gerast í samstarvi við spælararnar, sum eisini hava aðrar skyldur at taka sær av. Hetta helt Allan Simonsen eisini vera at stórum týdningi, tí hann dugdi ikki at síggja nyttuna í at fara á venjingarlegu kanska bara við sjey av spælarunum, sum skulu verða millum teir fyrstu ellivu í Luksemburg og Russlandi.

Sambært skránni skal landsliðið spæla tveir útidystir í NM kappingini í vetur. Tann fyrri skal spælast innandura í Svøríki í november, og tann seinni skal spælast innandura í Noregi í januar.

– Vit hava heitt á fótbóltssambondini í Svøríki og Noregi um at flyta hesar báðar landsdystirnar. Okkara ætlan er at flyta teir til í mars, soleiðis at teir kunnu brúkast sum beinleiðis fyrireikingardystir til útidystirnar í HM undankappingini, men enn vita vit ikki, hvat sviarnir og norðmenninir fara at siga til ynskið hjá okkum, sigur Jens Erik Magnussen.

– Vit fara á norðurlendskan fund í Finnlandi á ólavsøku, og tá vóna vit at fáa greiðu á, um tað ber til at flyta dystirnar móti Svøríki og Finnlandi.

Hetta sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum. Fundurin í Finnlandi verður frá 27. og til 30. juli í ár.

Næsti landsdysturin verður á Tórsvølli 16. august. Tá skulu Føroyar og Danmark spæla í norðurlendsku kappingini.

JH

# Jugoslavarnir eru á trappuni

*Spæliloyvið hjá nýggja KÍ málverjanum er komið til FSF, meðan tað framvegis verður bíðað eftir tí hjá álopsspælaranum, sum kemur úr Jugoslavia og til KÍ*

Fótbólturin í Føroyum hevur seinnu árini havt eitt rættuliga stórt íslett av jugoslaviskum fótbólti. Árið í ár er einki undantak í so máta, og nú sær tað út til, at tveir jugoslavar afturat fara at blanda seg uppí.

Sum vit áður hava sagt, so hevur KÍ í eina tíð arbeitt við at fáa tveir jugoslaviskar spælarar at hjálpa sær, og nú er navn sett á teir. Annar teirra er málverji. Hann eitur Zoltan Kujundzic, og hann er 32 ára gamal. Hann hevur higartil spælt í Spartak Subotitca, sum er í bestu deildini í Jugoslavia.

Subotitca er næststørsti býurin í Jugoslavia, og felagið er tað sama, sum Tomislav Sivic áður hevur spælt fyri. Tá Tomislav Sivic var í Jugoslavia í vetrarfrí, hevði hann ábyrgd av venjingini í gamla felagnum hjá sær, og tá var tað, at tað var avrátt, at royndi málverjin skuldi koma til Føroya. Umframt at vera við í kappingini um plássið millum stólparnar á besta liðnum hjá KÍ er tað ætlanin, at málverjin skal luta burturav sínum royndum sum málverji við ungu málverjarnar í Klaksvík.

Hin spælarin eitur Milicevic Srecko. Hann er ein ógvuliga stórur álopsspælari, sum er 22 ára gamal. Felagið, sum hann higartil hevur spælt við, eitur Obilic Zmajevo. Tað er ikki heilt greitt, nær útlendingarnir koma til Klaksvíkar, men teir vóna har norðuri, at tað verður heilt skjótt.

Vit skilja á lagnum, at áhugin millum jugoslaviskar fótbóltsspælarar at sleppa aðra staðni at royna seg er ógvuliga stórur. Hetta kemst ikki minst av, at tað er stór búskaparlig kreppa í landinum, og at tað tískil loysir seg heilt væl at fara í vinnu aðra staðni, eisini sjálvt um talan ikki er um fótbólt og harvið lønir á hægsta vesteureuropeiska støði.

**Fleiri útlendingar**

Sunnudagin spældi Tomislav Sivic fyri fyrstu ferð við KÍ. Hann var á vøllinum fyrsta tíman. Spælilioyvið hjá honum hevur higartil verið hjá B36, men nú er avtala gjørd millum feløgini, soleiðis at venjarin hjá KÍ eisini kann spæla við.

Á liðnum hjá KÍ eru umframt venjaran tveir aðrar útlendingar – Marek og Pazek, sum báðir eru pólverjar. Reglurnar hjá FSF siga, at hámarkstalið á útlendingum á einum liði er fýra. Tað kunnu vera fleiri enn fýra útlendingar í einum felag, men í mesta lagið kunnu fýra vera inni á vøllinum í senn.

Hjá KÍ er tað kortini eingin trupulleiki, sjálvt um teir fara at hava fimm útlendingar í felagnum. Bæði Tomislav Sivic og Marek Wierzbicki hava búð í Føroyum í fleiri enn trý ár. Sambært kappingarreglunum grein 16 verður útlendskur spælari roknaður sum útlendingur, um hann ikki hevur føroyskan borgararætt, og um hann ikki hevur havt fastan bústað í Føroyum seinastu trý árini frammanundan at umsókn um loyvisbræv verður latin kappingarnevndini.

FSF hevur áður staðfest, at útlendingar, sum búgva í Føroyum størsta partin av árinum, tí teir spæla fótbólt her, eru at rokna sum fastbúgvandi í Føroyum, sjálvt um teir í vetrarsteðginum eru í heimlandinum, har fleiri teirra hava konu og børn.

JH




*Tomislav Sivic fær í næstum tveir landsmenn afturat sær í leikarahópin hjá KÍ*